# Meiningar um Miðbýin

**Hvussu fáa vit lív í aftur miðbýin? Hetta er spurningurin, sum Miðlahúsið setur mánakvøldið kl. 20 - kjakið er longu hitnað her um leiðir**









BÝARLÍV
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*myndir: Jens K. Vang*

Miðbýurin stendur nógvum hjørtum nær, og akkurát sum við skúlamálum og fjølmiðlum, hava øll eina meining um miðbýin. Meiningarnar eru bæði nógvar og ymiskar, alt eftir hvønn týdning vit leggja í hetta økið, sum røkkur frá sjónleikarhúsinum og oman í vágirnar báðar.

Síðani vit lýstu við aðalorðaskiftinum hósmorgunin, hava telefonirnar kimað, og fólk steðgað okkum á gøtuni, fyri at siga sína hugsan um miðbýin. Hetta er eitt tekin um, at tørvur er á einum ordiligum kjaki.

### Ymisk á máli

Eftir øllum at døma er semja um, at miðbýurin er ikki ein virðiligur karmur um hátíðarløtur, handilsskap og fólkalív. Men fólk eru als ikki samd um, hvat tað er, sum misprýðir umhvørvið. Summi hugsa mest um arkitekturin, onnur um parkeringsviðurskiftini, og uppaftur onnur hugsa mest um hugna, gamlar dagar, tiltøk, fasadur ella útboðið av handlum og vørum.

### Seks íbirtarar

Vit hava biðið seks ymisk fólk at koma við hvør sínum stuttum uppleggi til kjakið. Hetta fyri at fáa íblástur til orðaskiftið, har øll kunnu taka orðið og siga sína hjartans meining. Tey, sum vit hava bjóðað eru: Heðin Mortensen, borgarstjóri, Ingigerð á Trøðni, leiðari á Kunningarstovuni, Elin Heinesen, stjóri í Samvit, Albert Isfeld, arkitektur, Guðrun Ludvig, vinnurekandi í gongugøtuni og Gilli Trónd, býarplanleggjari.

### Hugskot vælkomin

Vit eru greið um, at ongin niðurstøða verður á einum fundi sum hesum, tí ongin ávísur hevur ábyrgdina av miðbýnum. Kortini hevur býráðið evstu ábyrgdina fyri trivnaðinum í býnum og fyri býarplanlegginini. So vón okkara er, at umsitingin, politikararnir og tey handilsrekandi møta upp, og lurta væl eftir hugskotunum, sum koma fram hetta kvøldið.

Vertur: Rigmor Dam

**AÐALORÐASKIFTI** UM MIÐBÝIN

**Hvussu fáa vit lív í aftur miðbýin?**

**Almennur fundur um miðbýin í Havn verður í Miðlahúsinum í Vágsbotni mánakvøldið 09. juni kl. 20.**

**Luttakarar verða:**
- **Albert Isfeld,** arkitektur
- **Heðin Mortensen,** borgarstjóri
- **Ingigerð á Trøðni,** leiðari á Kunningarstovuni
- **Elin Heinesen,** stjóri í Samvit
- **Guðrun Ludvig,** vinnurekandi í gongugøtuni
- **Gilli Trónd,** býarplanleggjari

Vilja vit varðveita umhvørvið við Vaglið og Tinghúsvøllin, er einasta gongda leið er at keypa okkum burtur úr probleminum...
*Jógvan Arge, býráðslimur, tá ið Degns hús vórðu keypt*

Hvussu ber tað til, at tað er so ómøguligt at fáa betri parkeringsviðurskifti í miðbýnum í Havn?
*Spurningur settur Tórshavnar býráð í opnum brævi frá handlunum í miðbýnum.*

***Kom oman í Miðlahúsið og sig tína hjartans meining um miðbýin!***

miðlahúsið í Vágsbotni